# Stutt um tær mest vanligu eygnasjúkurnar

**Macula degeneration: ”Kikarasjón”**

- Sjúka á nethinnuni á økinum vit síggja klárt við (macula).
- Evnini at síggja klárt vikna
- Torført at lesa, skila litir,kenna aftur fólk á gøtuni og at síggja ”detaljur”
- Í serligum førum kunnu beina linjur virka krókutar
- Ávirkar bert fokus, har vit seta eyga á, hyggja at
- Umhvørvissjónin verður ikki rakt, tískil ikki heilt blind

Rakar oftast fólk yvir 50 ár, serliga vanligt hjá fólki yvir 75 ár.
Orsøk: evnini at fáa føðsluevnini til nethinnuna eru viknað
Royking, ov høgt ella lágt blóðtrýst kunnu elva til hesa sjúku.
Tosað verður um tvey ymisk sløg av AMD
Turt: mest vanligt – sjónin viknar stigvíst
Vátt: kann innan vikur/mánaðar oyðileggja førleikan at lesa
Viðgerð: Medisinsk viðgerð Lucentis veðrur regluliga sproyta inn í eygað.
Ávísar vitaminir/mineralir kunnu útseta framgongdina av sjúkuni.

**Retinitis Pigmentosa: ”kikarasjón”**
Nethinnusvinn, ið byrjar útvið.

- Felagsheiti fyri einari røð av arvaligum nethinnusjúkum, ið førir til skert sýnsfelt og ella blindni
- Umhvørvissjónin viknar líðandi
- Torført at brúka sjónsrestina í ferðslu – sosialt blindur
- Kikarasjónin, ið eftir er, kann vera heilt klár – torført hjá øðrum at skilja
- Byrjar við trupulleikum í skýming - náttarblindni
- Sera ljósviðkvom

RP er oftast orsøkin til ógvisliga niðursetta sjón hjá børnum og ungum
Orsøk: Sjónkiknurnar niðurbrótast/fara til grunda líðandi orsaka av genfeili í nethinnuni.
Viðgerð: enn er ongin viðgerð, ið kann steðga framgongdini av sjúkuni ella lekja skaðarnar á nethinnuni. Tó eru lovandi granskingar gjørdar, ið vónandi skjótt kunnu loysa RP-gátuna.

**Katarakt: ”grástær”**

- Eygnalinsan, sum vanliga er klár, verður óklár, grá
- Aldursbroytingar, mjørkatám
- Nærsýntur
- Ljósviðkvæmur
- Dupultsjón kemur eisini fyri
- Torført at lesa, koyra bil og vera úti í sól

Hetta er mest vanliga eygnasjúkan. Øll yvir 70 ár hava ein feril av grástær.
Orsøk: aldur – møguligt hjáárin av heiligvági ella aðrari sjúku t.d. sukursjúku
Viðgerð: skurðviðgerð – tann gamla linsan verður skift út við eina nýggja linsu í plastikk
Glaukom: ”grønstær”

- Trykkið inni í eyganum er ov høgt
- Sjónnervin verður oyðilagdur og sjónfeltið verður skætt
- Kemur ofta sníkjandi við árunum, sjónfeltið minkar
- Fokus ofta intakt

Tvey sløg av ”grøn stær”

- Tað kroniska slagið: kemur líðandi og uttan pínu
- Tað akutta slagið: mjørkatám og óbehag?, sterk pína, reytt eyga og vánalig sjón

”Grøn stær” kann raka í øllum aldri, men oftast rakar sjúkan eldri fólk.
Orsøk: arvilig sjúka, høgur aldur og etniskur uppruni kunnu hava sína ávirkan.
Skerd blóðcirkulatión?, høgt blóðtrýst, sukursjúka og nærsýni kunnu verða aðrar orsakir.
Viðgerð: minkað trýstið við eygnadropum, lasaraviðgerð, møguligari skurðviðgerð.
Tað raður um at uppdaga sjúkuna tíðliga, so viðgerðin kann steðga framgongdini.

**Diabetes retinopati: (sukursjúka)**
- sjúka á nethinnuni orsaka av sukursjúku
- blettir á sjónfeltinum
- sløarað sjón og vánalig kontrastsjón?
- sníkjandi og ikki altíð so lætt at uppdaga

Sukursjúka er oftast orsøkin til at fólk í yrkisbúnum árum hava sjóntrupulleikar. Sukursjúkan kann eisini viðføra ”grá- og grønstær”.
Orsøk: skaði á nethinnuni, um blóðsukurið hevur verið ov høgt í longri tíð. Høgt blóðtrýst og protein í vatninum kann m.a. eisini hava ávirkan.
Viðgerð: javnan til kanningar hjá eygnalæknanum.
Lasaraviðgerð og skurðviðgerð kunnu seinka/steðga framgongdini av skaðanum á nethinnuni.

**Sjóntrupulleikar aftan á heilaskaða/blóðtøpp**
- avmarkað sjónsfelt sær ikki til ta einu síðuna
- møguliga myrkur blettur i ovara ella niðara horni
- dovin eygnarørsla
- neglekt/avnoktan
- dupultsjón, ljósviðkvom o.a.

Stórur partur av teimum, ið fáa heilsaskaða uppliva ymiskar sjóntrupulleikar, ið kunnu geva lesitrupulleikar og har tey m.a. hava torført við at orientera? seg.
Ringt er at skilja, at tey síggja eplini á tallerkinum, men ikki køtið – ella koppa glasinum, ið stóð beint í blinda blettinum, renna á fólk o.s.frv.
Orsøk: Órógvan í blóðtilførslinum til heilan, orsaka av blóðtøppi ella heilabløðing, ið viðførir heilaskaða.
Viðgerð: málrættað sjónvenjan kann fáa viðkomandi at brúka eyguni rættari aftur.
Við ymiskum venjingum at styrkja eygnavøddar og rørslur og stimbra tað skædda økið á sjónfeltinum.